# Siðaarvssnurra

Hetta amboð er ment sum partur av verkætlanini “LIVIND - Creative and living cultural heritage as a resource for the Northern Dimension region”. Hetta er ein norðurlendsk og baltisk verkætlan, sum er fíggja og samskipa úr Finnland.

Prenta á tjúkt pappír, klipp eftir brotlinjuni og koyr eina splittu í miðjuna.

## Siðaarvssnurra

### *Hvussu geri eg?*

1. Tú kanst spæla sjálv/ur ella saman við einum øðrum.
2. Vel eitt slag av siðaarvi, sum hevur týdning fyri teg (t.d. eitt hátíðarhald, eitt handverk/-arbeiði, siðbundnan mat, spøl, ítriv ella virksemi úti í náttúruni).
3. Les, hvørji øki, tú kanst velja, ytst á snurruni, og vel eitt ella fleiri øki.
4. Hugsa um onkrar av spurningunum undir økinum, og hvat teir hava at siga fyri siðaarvin, sum tú hevur valt. Tosa saman um møgulig svar og skriva tey niður.

Tú kanst eisini leggja egnar spurningar afturat og svara teimum!

Arbeiðsbólkur: Ira Vihreälehto, lærari, Felagið fyri siðaarvsútbúgving í Finnlandi - Sari Marenk, lærari, Tampere - Maiju Hirviniemi, námsfrøðingur, Citizen Forum - Leena Marsio, fulltrúi, Finnish Heritage Agency • Uppseting: Studio Strandman • Íblástur til tólið: Wheelchart for Sustainable Development 10/2018. CC BY 4.0.

Museovirasto
Finnish Heritage Agency

Association of Cultural Heritage Education in Finland

LIVIND
Creative and Living Cultural Heritage as a Resource for the Northern Dimension Region

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

## *Við hesari snurruni kanst tú at hugsavna teg um siðaarvin!*

**Tú kanst fáa ein prát um siðaarv** ella hjálpa øðrum – ungum sum eldri – at gruna um siðaarvin. Endamálið við spælinum er at styrkja luttøkuna og áhugan millum børn og ung, og at vera ein løtt tilgongd til siðaarvin.

**Spurningarnir í snurruni** flyta teg runt í livandi siðaarvinum og burðardyggari menning. Siðaarvur eru siðir í lívinum hjá menniskjum, sum t.d. hátíðarhald/veitslur, handverk/-arbeiði, dansur, tónleikur, munnlig siðvenja og siðir og lív í sambandi við mat og náttúru. Siðaarvurin er millum okkum øll bæði til gerandisdagar og til hátíðir, til arbeiðis og tá vit taka okkum av løttum.

**Økini, sum eru á snurruni** eggja til eina felags læring millum næmingar og lærarar.

*At hugsa og at læra at læra • Mentanarførleiki, sín ámillum ávirkan og framsøgn • Umsorgan fyri sær sjálvum og gerandisførleikar • Lesi- og skriviførleiki • Kunningar- og samskiftisteldufførleiki • Arbeiðsroyndir og íverksetaraevni • Arbeiða við, hava ávirkan á og at byggja eina burðardygga framtíð.*

### **LÆRING** (L1, L2, L3, L5)

1. Hvussu hevur tú lært hetta? Hvør lærdi teg?
2. Á hvønn hátt hevur hendan vitanin og/ella førleikin týdning fyri teg?
3. Hevur tú borið hendan siðaarv víðari til onnur? Hvussu?
4. Hvussu hevur tøkniliga menningin ávirkað hendan siðaarv, um hon yvirhøvur hevur ávirkað hann?
5. Heldur tú, at hesin siðaarvur fer at vera til í framtíðini?



### **SAMSPÆL** (L1, L21, L7)

1. Ber til at fáa nýggjar vinir gjøgnum hendan siðaarv?
2. Fær hesin siðaarvur teg at kenna teg væl? Greið frá hví, ella hví ikki?
3. Kunnu øll vera við í hesum siðaarvi (hugsa um aldur, kyn, mentanarligar fortreytir, tvørrandi førleiki)? Hví, ella hví ikki? Um ikki, ber til at broyta hetta? Vilt tú broyta hetta?
4. Verður hesin siðaarvur virðismettur av øðrum? Hvussu tykist hesin siðaarvur at vera fyri onnur, sum ikki eru partur av honum (enn)?





### **MENTAN** (L2, L4, L7)

1. Hvør heldur hendan siðaarv í hevd? Hví gera tey tað?
2. Hvussu verður hesin siðaarvur borin víðari til onnur (t.d. við at skriva, gjøgnum orð, við at hyggja at myndum, við at gera)?
3. Um hesin siðaarvur hvørvur, hvat heldur tú hvørvur við honum? Eru t.d. serlig orð ella lutir, sum eru knýtt til hendan siðaarv, sum síðani eisini høvdu horvið.
4. Hvussu er hesin siðaarvur broyttur fram til í dag, ella kann hann broytast við tíðini?



### **BÚSKAPARLIGT** (L3, L6)

1. Kostar tað at havast við hendan siðaarv?
2. Kunnu vit vinna pengar við hesum siðaarvi? Hvussu?
3. Verður hugsað um hendan siðaarv sum eina vøru ella eina tænastu? Hvar og hvussu?
4. Er hesin siðaarvur arbeiðið hjá nøkrum?
5. Kann vinningur fyri eyga oyðileggja hendan siðaarv, um tað gerst ov sjónligt, at hugsað verður um vinning? Hvussu?



### **UMHVØRVIÐ** (L2, L7)

1. Hevur hesin siðaarvur samband við náttúruna? Hvussu?
2. Hvat tilfar verður nýtt í sambandi við hendan siðaarv? Hvaðani er tað innflutt, ella hvørjum tilfari er tað gjørt úr?
3. Hvussu ávirkar tað náttúruna at havast við hendan siðaarv?
4. Ber tað til at gera hendan siðaarv meira umhvørvisvinaligan? Hvussu?
5. Kann hesin siðaarvur læra okkum meira um náttúruna kring okkum? Hvussu?



Umseting: **Tjóðsavnið**